# Skrivstovufulltrúi til Løgtingsins umboðsmann

**Eitt starv sum skrivstovufulltrúi hjá Løgtingsins umboðsmanni er leyst at seta frá 1. november 2019.**

Talan er um eitt avbjóðandi, áhugavert og sjálvstøðugt starv. Tað er týdningarmikið, at tann, sum settur verður, dugir væl at orða seg skrivliga, er nærlagdur, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni.

**Uppgávurnar**
Umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði hevur skrivstovufulltrúin ábyrgd av journalisering, rættlestur, bókhaldi, ársfrágreiðing, heimasíðu og fyriskipan av vitjanum.

Vit vænta, at tú hevur:

- skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til 360 journalskipan
- góðan kunnleika til bókhaldsarbeiði
- góðan telduførleika
- evni at tillaga teg til broyttar arbeiðsumstøður

**Setanartreytir**
Lønar- og setanartreytirnar eru sambært sáttmála við Starvsmannafelagið, lønarflokkur 5.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og møguligum ummælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. september 2019 kl. 12.00.

Adressan er:
Løgtingsins umboðsmaður
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008
110 Tórshavn
t-postur: solja@lum.fo

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jette H. Eirikstoft, skrivstovufulltrúa ella Sólju í Ólavsstovu, umboðsmann á telefon 358500.

---

Umboðsmaðurin verður valdur av Løgtinginum og hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Umboðsmaðurin kann eisini taka mál upp til viðgerðar av sínum eintingum. Á skrivstovuni starvast dagliga umframt umboðsmannin, 3 løgfrøðingar og ein skrivstovufulltrúi.

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR